# Kunngerð

## um fólkatingsval í Fuglafjarðar kommunu

Til veljarar til fólkatingsvalið 8. februar 2005 í Fuglafjarðar kommunu.

Vísandi til at fólkatingsval er útskrivað, so skal hervið verða kunngjørt, at atkvøðugreiðslan fer fram í býráðssalinum týsdagin tann 8. februar 2005 fyri Fuglafjørð og Kambsdal og í sethúsunum hjá Annu Jensen fyri Hellurnar.

Atkvøtt verður millum kl. 09.00 og 20.00 og heldur fram, soleingi veljarar møta uttan støðg.

**Brævatkvøða:**
Veljarar, ið sambært vallógini hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð mánadag til fríggjadag millum kl. 10.00 og 15.00 til og við fríggjadagin 4. februar 2005. Tá seinasta freist fyri at greiða brævatkvøðu er leygardagin 5. februar 2005, so verður býráðsskrivstovan eisini opin nevnda dag millum kl. 13.00 og 17.00.

**Heimaval:**
Tey, sum vegna sjúku ikki kunnu koma á valstøðini, kunnu velja heima í seinasta lagi leygardagin 5. februar 2005 við at venda sær til býráðsskrivstovuna telefon 444006 ella 213006 í seinasta lagi leygardagin tann 5. februar 2005 kl. 15.00.

**Valkort:**
Valkort verða send veljarunum í kommununi við postinum, og um persónur, sum heldur seg hava valrætt, ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at seta seg í samband við býráðsskrivstovuna á telefon 444.006 skjótast.

Veljari hava valkortið við sær til valborðið.

Fuglafjørður, tann 26. januar 2005

**Fuglafjarðar býráð**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Kunngerð

## um býráðsfundir 2005

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at almennu býráðsfundirnir fyri ár 2005 verða hildnir hesar hósdagar kl. 16.30 í býráðssalinum:

| | |
|---|---|
| 27. januar | 17. februar |
| 31. mars | 28. apríl |
| 26. mai | 23. juni |
| 25. august | 29. september |
| 27. oktober | 24. november |
| 15. desember | |

Fuglafjørður, tann 28. januar 2005

**Fuglafjarðar býráð**

# Almennir fundir hjá Leirvíkar Bygdarráð í 2005

| | |
|---|---|
| Mánadagin 24. januar | Mánadagin 14. februar |
| Mánadagin 14. mars | Mánadagin 11. apríl |
| Mánadagin 9. mai | Mánadagin 5. juni |
| Mánadagin 29. august | Mánadagin 26. september |
| Mánadagin 24. oktober | Mánadagin 21. november |
| Mánadagin 12. desember | |

Fundirnir eru kl. 19.30 í bygdarráðshúsinum.

Mál, sum skulu vera viðgjørd á bygdarráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

Eykafundir ella broytingar til omanfyrinevndu verða lýstir í talvuni.

**Kommunuskrivstovan er opin:**

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 9.00-12.00 |
| Týsdag | kl. 9.00-12.00 |
| Mikudag | kl. 9.00-12.00 |
| Hósdag | kl. 9.00-12.00 og 15.00-17.00 |

**Leirvíkar Bygdarráð**

GSM telefonir
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
Tráðleysar
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
Til skip og bátar
NMT 450 - VHF telefonir v.m.
Storno
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

# Eykapolitistur

Eitt fyribilsstarv fyri eykapolitist í farloyvi hjá politinum á Tvøroyri er leyst at søkja.

Setanartíðin verður møguliga fram til árslok 2008.

Tænastutíðin er 6 tímar um vikuna – vanliga um kvøldið. Samsýningin íroknað viðbót er í løtuni 3.090,05 kr. um mánaðin.

Umsóknarblað fæst á politistøðini á Tvøroyri.

Umsókn verður at senda til Føroya Landfúta, postboks 3018, 110 Tórshavn, innan 7. februar 2005.

Føroya Landfúti, Tórshavn hin 21. januar 2005

**M. Nepper Christensen**

# Fólkatingsvalið 8. februar 2005

**til veljarar í Sands kommunu**

Valið fer fram í kjallaranum í nýggju kommunuhúsunum (fyrrverandi Úrvæl)

**frá kl. 9.00 til 20.00.**

Valkort verða send veljarunum.

Seinasta freist at greiða brævatkvøðu til fólkatingsvalið er leygardagin 5. februar.

Tey, ið ikki eru før fyri at koma á valstaðið, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 361034 innan kl. 12.00 fríggjadagin 4. februar.

Minnist til at hava valkortið við á val.

**Sands kommuna**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Skálvíkingar

Uppskot til veganøvn fyri Skálavíkar kommunu hanga alment frammi í Undirhúsinum til 1. apríl.

Húsið er opið mánadag–leygardag frá kl. 9–17.00.

**Bygdaráðið**

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
Beinleiðis frá framleiðara
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820

# Eldri sethús í Norðskála til sølu

Um hóskandi boð fæst, eru eini eldri sethús í góðum standi við fríttstandandi hjalli og stórum neysti til sølu. Møguleiki er at geva boð uppá ognina, við ella uttan neyst.

Húsini ið eru bygd í 1947 eru 6,40 x 7,70 metrar, hava kjallara, miðhædd og loft, og neystið er 5,50 x 10,0 metrar við lofti.

Um hettar hevur áhuga er møguligt at ringja til

**tlf. 422135 helst millum kl. 17 og 20 og frætta nærri.**